UTTAN ÚR HEIMI

# Minningarhald á donskum herstøðum

**Hermenn mintust teir tríggjar donsku hermenninar, sum doyðu í Kabul mikudagin. Men Danmark heldur fram við arbeiðinum í Afghanistan**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*



*Ovastin fyri týsku herleiðsluni, generalurin Harald Kujat, kunnar týsku fjølmiðlarnar um vanlukkuna í Kabul. Harald Kujat og danski verjuovastin, Christian Hvidt, hava avtalað at skipa fyri einari felags kanning av tí, sum hendi*

*Mynd: Reuters*

Hóast hermenninir í herstøðunum í Farum og Skive framvegis ikki høvdu fingið at vita, hvørjir teir tríggir deyðu ella teir tríggir særdu hermenninir vóru, var minningarhald á báðum støðunum í gjár. Donsku hermenninir, sum vórðu sendir til Kabul, eru úr verkfrøðideildini hjá danska herinum, og hendan deildin heldur til í Skive og Farum. Tí vóru minningarhaldini har.

Í gjár vórðu líkini av teimum trimum donsku hermonnunum og teimum báðum týsku feløgum teirra, sum eisini doyðu í vanlukkuni, flutt við flogfari til Usbekistan og haðani víðari við einum sjúkraflogfari til Køln í Týsklandi. Eitt danskt hernaðarflogfar skuldi so flyta tey trý líkini og teir tríggjar særdu til Danmarkar.

Í gjár hevði danska herleiðslan framvegis ikki almannakunngjørt nøvnini á teimum seks hermonnunum, tí herleiðslan hevði ikki fingið fatur á teimum avvarandi hjá einum teirra.

## Halda fram

Bæði danska herleiðslan og stjórnin hava gjørt greitt, at vanlukkan í afghanska høvuðsstaðnum fær onga ávirkan á donsku luttøkuna í arbeiðinum. Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri var sjónliga skelkaður, tá hann kunnaði fjølmiðlarnar um vanlukkuna, men hann legði samstundis dent á, at Danmark fer at halda fram við arbeiðinum í Afghanistan. Tað sama søgdu umboð fyri allar teir politisku flokkarnar í Fólkatinginum.

Christian Hvidt, verjuovasti segði á tíðindafundi mikukvøldið, at vanlukkan hevði skelkað alla verjuleiðsluna. Hann boðaði frá, at hann og týski verjuovastin, Harald Kujat, hava avtalað at skipa fyri einari felags kanning av tí, sum hendi.

Týski samveldiskanslarin, Gerhard Schrøder, segði, at vanlukkan í Kabul er enn ein tekin um, hvussu vandafult arbeiðið hjá hermonnunum í Afghanistan er. Eisini hann gjørdi greitt, at Týskland fer at halda fram við sínum arbeiði í Afghanistan.

## Gamlar rakettir

Teir donsku og týsku hermenninir vóru í ferð við at oyðileggja nakrar gamlar russiskar rakettir av slagnum SA-3, tá vanlukkan hendi. Teir høvdu júst oyðilagt eina rakett og vóru á veg til ta næstu, tá vanlukkan hendi.

SA-3 rakettirnar eru umleið 40 ára gamlar. Sovjetski herurin nýtti nógvar av hesum rakettunum í krígnum í Afghanistan, og nógvar teirra liggja framvegis har óbrostnar. Ein deild við verkfrøði-hermonnum úr Danmark, Týsklandi, Hollandi og Eysturríki hevur fingið til uppgávu at beina fyri teimum óbrostnu rakettunum umframt gonslum russiskum minum.

Danska verjuleiðslan sigur, at teir donsku hermenninir hava góða venjing til hetta arbeiðið, men kortini hendi vanlukkan. Nú skal kannast, hví vanlukkan kortini hendi.

# – Skjót heldur meg!

**Mamma Fadimu Sahindal bað mannin skjóta seg heldur enn sína egnu dóttur, men hann vildi ikki lurta**

Ærumorðið á ta 26 ára gomlu kurdisku kvinnuna Fadimu Sahindal í januar skelkaði alt Svøríki.

Mikudagin var mamma hennara til avhoyringar hjá svensku løgregluni. Hon greiddi frá, at hon, Fadima og tvær yngri døtur vóru komnar saman um kvøldið tann 21. januar, tá onkur brádliga bankaði á dyrnar. Systir Fadimu, sum átti íbúðina, fór uttar at vita, hvør tað var. Ígjøgnum eitt hol í hurðini sá hon, at tað var pápi hennara. Tær fýra vóru greiðar yvir, at hann ætlaði sær at revsa Fadimu, tí hon hevði havt ein svenskan drong, og tær avgjørdu tí ikki at lata dyrnar upp. Ístaðin sløktu tær ljósið inni og sjónvarpið. Tá tær einki hoyrdu aftur í ein hálvan tíma, hildu tær, at pápin mundi vera farin, men tá Fadima um hálvgum tíggju-tíðina ætlaði sær til hús, stóð pápin í hurðini fyri henni við skammbyrsu í hondini.

Undir avhoyringini mikudagin greiddi mamman frá, at tað eydnaðist sær at fáa í armin á manninum.

- Skjót meg! Skjót heldur meg, rópti eg.

Men Rahmi Sahindal lurtaði ikki eftir henni. Ístaðin setti hann skammbyrsuna ímóti høkuni á Fadimu og skjeyt. Eftir at hon var dottin niður á gólvið í gongini, skjeyt hann hana tvær ferðir afturat í høvdið.

Mikudagin avgjørdi svenska ákæruvaldið at ákæra Rahim Sahindal fyri morð.

Búskapur og vinna:

## Ósemja um olju

Ósemja hevur tikið seg upp í norsku stjórnini. Vinnumálaráðharrin, Ansgar Gabrielsen, tekur undir við einari ætlan, sum miðjar eftir at leggja olju- og gassdeildina hjá Hydro saman við Statoil, men hesum er oljumálaráðharrin, Einars Steensnæs, ímóti. Oljumálaráðharrin heldur tað vera ein fyrimun við tveimum stórum feløgum, men vinnumálaráðharrin heldur tað vera rættari at leggja feløgini saman.

Norski staturin eigur 80 prosent av Statoil og 44 prosent av Hydro. Verður samanleggingin veruleiki, fær staturin einsamallur ræðisrættin yvir felagnum, tí tað almenna fer at eiga umleið 70 prosent. Norskir serfrøðingar siga, at tað samanlagda felagið fer at hava eitt marknaðarvirði, sum verður um 200 mia. krónur.

## Samanlegging góðkend

Amerikansku kappingarmyndugleikarnir hava góðkent, at tær báðar stóru teldufyritøkurnar HP og Compaq verða lagdar saman. Frammanundan hevur ES-nevndin boðað frá, at hon góðkennir eisini samanleggingina.

Enn er málið tó ikki avgreitt, tí partaeigararnir í HP hava ikki sagt sína hugsan enn. Tað verður gjørt á fundi tann 19. mars, og spenningurin er stórur, tí arvingarnir eftir teir báðar stovnararnar, Hewlett og Paskard, hava higartil verið ímóti samanleggingini, og tey royna framvegis av øllum alvi at forða málinum.

Tann 20. mars skulu eigararnir í Compaq taka støðu til samanleggingina, men sum skilst er eingin trupulleiki har.

Tær báðar fyritøkurnar kunngjørdu longu í fjør, at tær ætlaðu at leggja saman

Úr Norðurlondum:

## Sleppur ikki at vitja

Svenska stjórnin hevur gjørt av at sýta taiwanska forsetanum, Chen Shui-bian, innferðarloyvi til Svøríkis. Forsetin varð boðin at halda røðu á landsfundinum hjá svenska Fólkaflokkinum, men tað verður av ongum.

Formaðurin í Fólkaflokkinum, Lars Lejenborg, sigur, at stjórnin krýpur fyri einaræðinum í Kina, sum hann tekur til. Men Anna Lindh, uttanríkisráðharri vísir á, at eins og hini ES-londini viðurkennir Svøríki ikki Taiwan sum sjálvsstøðugt ríki. Uppfatanin er, at Taiwan er ein kinesisk oyggj og partur av kinesiska ríkinum.

## Tað skal kosta

Danski løgmálaráðharrin, Lene Espersen, hevur nú gjørt av at herða revsingina til vertshús og matstovur, sum skeinkja rúsdrekka til fólk, sum eru yngri enn 18 ár. Í dag fáa vertshúsini og matstovurnar 600 krónur í bót, men løgmálaráðharrin heldur, at bótin stendur als ikki mát við tann vinning, sum hesi hava av at selja rúsdrekka.

Lene Espersen sigur, at skuldi tað víst seg, at tað ikki er nóg mikið at gera bøturnar størri, er hon til reiðar at fara í Fólkatingið fyri at fáa tað at broyta lógina, sum hesi virka undir.

## Varðveitir ognir

Norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, heldur, at norska kirkjan skal sleppa at varðveita sínar ognir, verður kirkjan loyst frá statinum, soleiðis sum fleiri politikarar mæla til. Fleiri av teimum fremstu norsku løgfrøðingunum eru av somu áskoðan.

Norska kirkjan eigur m. a. 12.200 jarðarstykki í 380 kommunum umframt 80 stórar prestagarðar, 980.000 mál av skógarøki og 460 prestabústaðir. Ognirnar hjá kirkjuni eru mettar til at vera umleið fýra mia. krónur verdar.



UTTAN ÚR HEIMI

# Vænta veruligt kríggj í Miðeystri

**Serfrøðingar í Miðeystur-viðurskiftum siga tað vera sannlíkt, at ófriðurin millum ísraelsmenn og palestinar fer at enda í veruligum kríggi. Báðir partar herða tiltøkini**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Serfrøðingarnir ivast ikki í, at harðskapurin fer at vinda enn meiri upp á seg, eftir at ísraelski herurin beindi fyri tveimum limum í Fatahfelagsskapinum týskvøldið. Teir báðir menninir sótu í einum bili, sum var á veg ígjøgnum býin Ramallah. Brádliga skjeyt ein ísraelsk stríðstyrla eina rakett eftir bilinum, sum fór í luftina.



*Skyldfólk og vinmenn fylgja einum ísraelskum hermanni til gravar*

*Mynd: Reuters*



*Á Vestara Áarbakka: Skyldmenn til jarðarferð hjá einum falnum palestina*

*Mynd: Reuters*

Annar av monnunum í bilinum var Muhamad Abu Halawa, sum slapp undan einari tilsvarandi ísraelskari atsókn seinasta heyst.

Vesturlendskir politikarar hava fleiri ferðir kallað hetta slagið av ísraelskum álopum beinleiðis avrættingar, og serfrøðingar vísa á, at hvørja ferð ísraelski herurin hevur framt eitt tílíkt álop, hava palestinsku hevndarálopini verið umfatandi.

Tilburðurin í Ramallah var bara ein av fleiri týsdagin. Stutt eftir klokkan tvey um náttina fór tann 20 gamli palestinin Ibrahim Hassouna inn á eina matstovu í Tel Aviv við maskinbyrsu síni. Tá avtornaði, lógu tríggir ísraelsmenn og Ibrahim sjálvur deyðir á gólvinum.

Eygleiðarar siga, at drápini í Ramallah og Tel Aviv eru úrslitið av einum vanstýrdum Miðeystri, har eitt hernaðarálop elvir til tað næsta, og har dráp altíð verður hevnt við drápi. Bara hesa seinastu vikuna hava meiri enn 60 palestinar og meiri enn 30 ísraelsmenn latið lív, og hóast tað hava báðir partar boðað frá, at teir fara at herða síni tiltøk. Ísraelski forsætisráðharrin hevur í hvussu er ongar ætlanir um at verða tann fyrri, sum slakar.

- Vit fara at leypa á palestinska sjálvsstýrið, til tað biður um grið, segði Ariel Sharon við Jerusalem Post týsdagin.

## Veruligt kríggj

Fleiri viðurkendir Miðeysturserfrøðingar siga, at heldur ófriðurin fram, kann hann enda sum veruligt kríggj. Tað einasta, sum kann forða krígnum, er, at eitt ella annað óvæntað hendir, eitt nú at Yasser Arafat doyr, at Ariel Sharon verður koyrdur frá, ella at USA leggur fram eitt friðaruppskot, sum báðir partarnir taka undir við. Men serfrøðingarnir ásanna, at eingin av hesum møguleikunum er serliga sannlíkur.

- Eg veit ikki, hvussu leingi hetta kann standa við. Kanska seks mánaðir, kanska seks vikur ella kanska tvey ár. Men eg veit, at halda báðir partar á at herða tiltøkini, fer kreppan at enda sum veruligt kríggj, sigur professarin Khalil Shikaki, sum arbeiðir á einum granskingarstovni í Ramallah.

Ísraelski starvsbróður hansara, Yoram Meital, professari á Ben Gurionstovninum í Negev, tekur undir við Khalil.

- Tað er týðiligt, at báðir partar eru til reiðar at rinda ein høgan prís fyri at halda fram við bardaganum og at herða hann, og tískil versnar kreppan. Eg havi eisini varhugan av, at hvørgin parturin dugir at síggja, hvussu kreppan skal loysast, uttan at onkur uttaneftir leggur uppí. Tað er ikki óhugsandi, at tað endar í veruligum kríggi, og tað er ein spurningur, um tað fer at bera til at savna altjóða stuðul til at forða tí, sigur ísraelski professarin.

Youran Meital heldur, at ST og ES kunnu virka við til at loysa kreppuna, men hesum er Khalil Shikaki ikki heilt samdur við honum í.

- ST? Hvar er ST, spyr hann. Tað er bara USA, sum hevur vald til at tryggja frið í Miðeystri. Men hugsa vit um tað, sum vit hava hoyrt úr Washington, so er lítið, sum bendir á, at nakað fer at henda, so leingi George W. Bush er forseti, sigur Khalil Shikaki.

## - Eg fari fegin

Egyptiski forsetin, Hosni Mubarak, sum í gjár hitti Bush í Washington, roynir at fáa Arafat og Sharon til Kairo at tingast. Tá Sharon varð spurdur, um hann er til reiðar at fara til Kairo, hevði hann eftir øllum at døma ikki gloymt avgerðina hjá ísraelsku stjórnini at byrgja Arafat inni í Ramallah.

- Eg fari fegin, men eg vænti, at Arafat verður forðaður í at fara, svaraði Sharon.

Búskapur og vinna:

## Microsoft hóttir

Microsoft hóttir nú við at taka aftur Windows XP og at gevast við at menna nýggjar stýriskipanir fyri at mótmæla, at níggju amerikanskir statir hava gjørt av at halda fram við sakarmálinum um einkarrættin hjá felagnum.

The Washington Post skrivaði í gjár, at verður Internet Explorer skilt frá Windows, soleiðis sum teir níggju statirnir krevja, kann Microsoft kenna seg noytt til at taka Windows XP av marknaðinum, samstundis sum felagið fer at gevast at menna nýggjar stýriskipanir.

## Lítið afturfyri

Felagið hjá donsku ídnaðarvirkjunum heldur, at fólk, sum fáa sær eina hægri útbúgving, fáa ov lítla løn fyri útbúgvingina. Sambært felagnum vísa kanningar, at væl útbúgvin fólk í øðrum londum fáa væl meiri burturúr.

Danska ídnaðarfelagið sigur, at tann lítla samsýningin ger, at tey ungu aftra seg við at fara undir hægri lesnað. Víst verður á, at tíggju ár aftan á fólkaskúlan hava meiri enn 30 prosent av teimum ungu onga útbúgving ella eru í ferð við at útbúgva seg.

Dambært Dansk Industri er ov lítil munur á lønini hjá ólærdum og teimum við góðum útbúgvingum. Í Danmark liggur munurin um 40 prosent, men felagið nevnir sum dømi, at í Hollandi er tilsvarandi munurin 60 prosent og í USA heili 160 prosent.

## Ov langur

Norsku sjóferðslumyndugleikarnir góvu herfyri boð um at kappa 23 sentimetrar av einum báti, sum siglir millum Kristiansand og eina lítla oyggj. Orsøkin var, at skiparin hevði bert loyvi at føra før upp til 15 metrar, men tá báturin vísti seg at vera 15,22 metrar, var einki annað at gera enn at kappa 23 sentimetrar av gronini. Og so varð gjørt.

Úr Norðurlondum:

## Ongan smáfisk

Norsku fiskivinnumyndugleikarnir arbeiða við einum uppskoti, sum skal bera í sær, at fólk, sum fara í bátin at fáa sær eitt kók av smáfiski, skulu halda somu reglur um minstamát sum tann vanliga fiskivinnan. Norðan fyri 64. breiddarstig er minstamáti á toski 47 sentimetrar, meðan tað er 30 sentimetrar har suðuri.

Eitt av endamálunum við reglunum er at avmarka fiskiskapin hjá útlendskum ferðafólki. Ein kanning hevur víst, at útlendsku ferðafólkini fiska umleið 15.000 tons við norsku strendurnar um árið.

## Nýggir limir

Meðan norski Arbeiðaraflokkurin missir limir í hópatali, gongur tað heldur frægari hjá sosialdemokratiska flokkinum í Danmark.

Leiðslan sigur, at flokkurin hevur fingið 3.000 nýggjar limir síðani valósigurin í november, men einki verður sagt um, um ella hvussu nógvir limir eru farnir úr flokkinum.

Tað er heldur ikki greitt, hvussu nógvar limur sosialdemokratiski flokkurin hevur, men fyri tveimum árum síðani var limatalið beint oman fyri 50.000. Fyri tjúgu árum síðani var tað oman fyri 100.000.

## Prestur dømdur

Ein dómstólur hevur dømt ein 44 ára gamlan prest í Møre og Romsdal í Noregi fyri at hava gjørt seg inn á sínar egnu døtur og eina kvinnu, sum hann var sálarhirði hjá.

Ein lægri rættur dømdi herfyri prestin hálvt sætta ára fongsul fyri ógerðina, samstundis sum hann misti rættin at virka sum prestur og sálarhirði, men presturin kærdi dómin. Hesaferð var málið fyri í einum nevningatingi, og sjálv revsingin er tí ikki ásett enn. Presturin eigur tríggjar døtur, og tær vóru allar yngri enn 14 ár, tá hann gjørdi seg inn á tær.